Sofus Clementsen, postverksstjóri:

# Spennandi avbjóðing at leiða Postverkið



1. oktober tók Sofus Clementsen við sum stjóri á P/f Postverki Føroya

**Fríggjadgin 17. november skipaði nevndin í P/f Postverki Føroya fyri almennari móttøku á Frímerkjadeildini á Argjum í sambandi við at Sofus Clementsen tók við sum stjóri á stovninum 1. oktober 2006**

MÓTTØKA
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

Sofus Clementsen er nýggjur stjóri í P/f Postverki Føroya. Sofus er 41 ára gamal og hevur seinastu 10 árini búð og starvast í Danmark, har hann millum annað hevur starvast hjá altjóða teldufyritøkuni CSC. Har hevur hann verið programmleiðari í fyritøkuni, sum hevur 80.000 starvsfólk um allan heimin. Harumframt starvaðist hann eitt áramál hjá ATP sum verkætlanarleiðari.

Sofus hevur eisini royndir innan føroyska vinnulívið, eitt nú starvaðist hann eitt áramál á Elektron. Hann er útbúgvin MBA frá Danmarks Tekniske Universitet og HD frá Handilsháskúlanum í Keypmannahavn.

Hann sær tað sum eina stóra avbjóðing og eitt tað mest spennandi, sum kundi henda í lívi hansara júst nú, at sleppa at ganga á odda fyri at nútímansgera postverkið.

Undir móttøkuni hildu Bjarni Djurholm, landsstýrismaður, Jan Danielsen, nevndarformaður í P/F Postverk Føroya og Sofus sjálvur røðu.

Jan Danielsen segði m.a., at tað var honum ein stór gleði vegna Postverk Føroya at bjóða Sofusi vælkomnum, og samstundis takkaði hann honum fyri, at hann valdi at taka av hesi avbjóðing.

Sofus bleiv valdur út frá sínum persónligu dygdum, sínum útbúgvingum og sínum drúgvu leiðsluroyndum serliga uttanlands. Vit meta at hann, við sínum persónligu eginleikum og góðu fakligu førleikum og royndum, er rætti persónurin at leiða Postverk Føroya inn í hesa nýggju tíðina.

Heimurin vit liva í í dag umskiftist alsamt meira og meira og við størri og størri ferð – hetta merkir, at vit eisini sjálvi mugu umstilla okkum skjótari og skjótari, skulu vit fylgja við. Vit síggja øll fram til eitt gott og gevandi samstarv, sum vit vænta okkum nógv av, segði Jan Danielsen, nevndarformaður í Postverki Føroya.

Tað var 1. januar 2005 at P/f Postverk Føroya varð umlagt til partafelag.



*Sofus og Heðin Mortensen, borgarstjóri*



*Sofus saman við og konuni, Tordis*



*Jan Danielsen, nevndarformaður í P/F Postverk Føroya, segði m.a., at Sofus bleiv valdur út frá sínum persónligu dygdum og drúgvu leiðsluroyndum*



*Sofus Clementsen saman við Bjarna Olsen og Finn Danberg frá Føroya Sparikassa*



*Richard Mortensen frá Føroya Tele heilsar upp á Sofus*



*Bjarni Djurholm landsstýrismaður heilsar upp á postmeistarfrúuna*